# Aftur ein góð Kvørn

Nú um dagarnar kom út Kvørnin nr. 11. Tað er Sands Forminnafelag, sum gevur út hetta rit, sum við sínum 66 síðum hevur ein hóp av áhugaverdum søguligum tilfari. Hetta er fyrst og fremst úr Sandoynni, men tilfarið greinar seg tó út til alt landið.

Tey sum hava ábyrgd av útgávuni eru Ólavur Clementsen, Marna Jacobsen og Julianna Joensen.

Tað skal fyrst sigast, at tað er eitt kvett, at tað finnast fólk, sum vilja festa okkara søgu á blað. Er hon fyrst niðurskrivað, so er hon eisini varðveitt fyri eftirtíðina. Verður bíðað, kann tað ofta gerast ov seint.

Kvørnin hesa ferð er eisini full av áhugaverdum tilfari. Her er eisini eitt áhugavert íkast til okkara sjóvinnusøgu, sum Jens Marius Hentze hevur skrivað. Tað er næstan ikki mark fyri, hvat fiskimenn hava verið út fyri í síni tíð, sum tað ið hendi við Falkinum í 1918. Søgan er í stuttum, at teir fara avstað til fiskiskap og eru í vanda fyri at sigla á Flesjarnar vestanfyri Suðuroynna. Teir fara í bjargingarbátin, sum veruliga er nógv ov lítil til alla manningina.

Søgan var annars í stuttum, at skipið fer fram við Flesjarnar, og teir at rógva aftaná. Teir lova olmussu, hóast hetta sær sera illa út. Teir fáa skipið aftur, og tað eydnast við einum rimmar lopi hjá einum av manningini at koma umborð, og teir verða bjargaðir. Teir kenna tað, sum um "Gud leyp við honum", og olmussan verður sjálvandi latin.

Bert eitt lítið uppskot: Ein slík grein hevði verið meiri lesilig, um hon varð býtt upp við millumyvirskrivtir.

Ólavur Clementsen hevur sínar ættargreiningar, ið sum vanligt eru sera áhugaverdar. Ikki minst um ættina Uppi í Stovu á Sandi, sum hevur fostrað nógv merkisfólk, sum nógv okkara kennast við. Søgan byrjar við Mass Andrias Winther f. 1813, sum verður settur sum sýslumaður á Sandi. Hann er beiggi Niels Winther, okkara fyrsta politiska "sjálvstýrismann". Nógv av teimum, sum eita Winther, eru ættað frá Mass.

Her kann gerast eitt lítið ískoyti um Gunnar Winther. Umframt at vera løgtingsmaður var hann eisini formaður í Føroya Fiskimannafelag 1928-1931. Í 1932 tapti hann formannssessin til Hans Jacob Havstreym, sum tó gekk burtur sama vár við Immanuel.

Ólavur skrivar eisini um Klæmintsstovu í Dali, har tað búði eini rættiligur originalur Óli Jákupsson (1831-1877), sum heldur vildi lesa enn at arbeiða! Hann kundi í síni samtíð ikki vera í ordan!

80 ára gamli Palli Dalsgaard er ikki "fyri nothing". Han hevur eina áhugaverda grein um ein stranding, sum gjørdist bóndi í Dalsgarði.

Katrina Joensen hevur grein um Ungmannafelagið í Skopun, sum var stovnað í 1923 og enn er til. Ein kassameistari var Marianna Clementsen. Vit hava havt frásøgn um hana og hennara børn í sambandi við Kolturstevnuna í august. Tey endaðu í Noregi og Canada. Sjálv var hon á veg til Canada, tá ið hon gjørdist sjúk og settist aftur.

Hanus A. Samuelsen hevur grein um Húsavík, har tað í 1801 vóru 13 húsarhald við 54 fólkum.

Símun V. Arge og Robert Friel skriva um víkingaaldarbúseting í Søltuvík. Eisini er hópur av áhugaverdum myndum.

Kvørnin kostar kr. 80. Hon er avgjørt pengarnar verd. Tey sum hava áhuga fyri siðsøgu eiga sjálvsagt at ogna sær hana. Tað eiga øll onnur eisini, tí fyrr ella seinni fáa øll áhuga fyri slíkum tilfari. Tá er gott at hava tað liggjandi!

**ó.**




*Kvørnin er verd at ogna sær*



*Uppi í Stovu. Ótrúliga nógv merkisfólk eru ættað úr hesum húsum*

**Dagurin**

**21. november. Mariu offurgerð**. Dagurin hildin til minnis um, at foreldrini leiddu hana niðan í halgidómin. 3 ára gomul gekk Maria einsamøll niðan tær 15 trappurnar inn í hitt alraheilagsta, har rætta tilhald hennara átti at vera.

**22. november. Cecilia**, deyð umleið ár 225. Rómversk genta, sum frá barnsbeini hevði verið kristin. Foreldur hennara góvu hana í hjúnalag við heidnan ungan mann, Valerianus, men sjálva brúðarnáttina umvendi hon hann. Varð tikin av døgum í Róm sum píslsluváttur. Rómverskt ættarnavn, ið merkir tann blinda. Nikolai Mohr føddur hendan dagin í 1742.

**23. november. Klæmintsmessa**. Vit vita, at hesin Clemens (deyður umleið ár 107) livdi í Róm, tá ápostulin Pætur var á døgum, og gjørdist triði maður í stóli hansara. Eftir øllum at døma hevur hann skrivað tað brævið, ið verður rópt fyrra Klæmintsbræv, sum er frá árinum 96.

# Eyðun og Kári framsýning í Reykjavík

Eyðun av Reyni og Kári Svensson lata upp framsýning í Tjarnarsalinum á Ráðhúsinum í Reykjavík fríggjadagin 21. november kl. 16

Á framsýningini verða sýnd fram verk, sum øll eru málað til framsýningina – umleið 28 málningar.

Framsýningin er opin í tíðarskeiðinum 21. november - 6. december. Framsýningin er fyriskipað í samarbeiði við Listagluggan, Niels Finsensgøta 25 Tórshavn.



*Eyðun av Reyni*



*Kári Svensson*